# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# 100 ára føðingardagurin hjá Astrid Frederiksen

Tað kann ikki sigast annað enn, at tey eldast væl á Ellisheiminum í Havn. Tað er lítið meira enn ein vika síðani, at vit kundu greiða frá 101 ára føðingardegi, og í gjár 21. august var 100 ára føðingardagur hjá Astrid Frederiksen.

Her var fitt av fólki komið at ynskja Astrid tillukku. Almennir gestir vóru løgmaður, landstýrismaðurin í Almannamálum og umboð fyri Almannastovuna og Býráðið. Fleiri røður vóru hildnar.

Jákup Lindenskov hevði eina frálíka grein um Astrid í blaðnum leygardagin. Eitt tað svárasta hjá Astrid man hava verið, tá ið hon "misti" dóttrina Onnu. Hon var fødd við feili í fótinum, og pápin, Hjalmar, var farin niður við henni at fáa viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Pápin fer heimaftur, og tá ið viðgerðin var liðug, skuldi Anna fara heim við Tjaldrinum. Mammubeiggin, Pedda Egholm, sum sigldi við, skuldi hava hana undir hond. Í bíðitíðini búði Anna hjá mostrini Ingrid, sum átti ta eitt ára yngru dóttrina Bente. Tær høvdu tað so gott saman, at avrátt varð, at Anna skuldi bíða ein fart við Tjaldrinum at fara heim. Tá er tað, at Danmark verður hersett í 1940. Alt samband millum Føroyar og Danmark verður kvett, og Anna sleppur ongan veg. Í fyrsta umfari býr Anna hjá mostrini. Í somu uppgongd býr ein familja, sum tey kenna væl, við ongum børnum. Anna flytir so til teirra, og hon kemur sum frá líður at meta tey sum foreldur. Síni egnu foreldur mintist hon ikki sum rímiligt er. Hon var bert eitt ár, tá ið hon fer úr Føroyum.

Astrid átti eisini eina aðra systir, Jenny, sum búði niðri. Sigast kann, at tær eldast væl, tí systrarnar blivu reiðiliga 90 ára gamlar. Astrid átti eisini eina tvíburasystir, Maria, sum doyði heilt lítil av kykhosta. Brøðurnir vóru Hans og Pedda, báðir kendir havnarmenn.

Vit vóru við í føðingardegnum og tóku nakrar myndir.

**ó.**



*Sonni saman við mammuni*



*F.v. abbasynirnir Annfinn og Hjalmar Frederiksen, synir Sonna. Teir láta væl at ommuni, sum teir búðu inni hjá, tá ið teir vóru smáir. Tá ið tey skuldu flyta fyri seg sjálvan, høvdu teir ongan hug at fara. Langommusynirnir eru Sonni, undir liðini á Hjalmar, og David*



*Millum gestirnar var Haldgrim Gregersen úr Gøtu saman konu síni Halgerð. Til høgru er fastur hansara Halda, sum býr á Ellisheiminum*



*Bente er systirdóttir Astrid. Hon er komin úr Danmark at heiðra mostrina. Tá ið Astrid fylti 80 ár lovaði Bente mostrini at koma til Føroyar á hvørjum ári at vitja hana, og tað hevur hon eisini hildið. So vit vænta at síggja hana aftur komandi ár!*



*Løgmaður ynskir Astrid tillukku við teimum 100 árunum*